## Ongland legði bragdliga fyri

Ongland vann leygardagin stórsigur á Andorra í EM-dystinum í Machester. Úrslitið gjørdist 5-0 til Ongland, sum væl kundi havt skorað fleiri mál móti lítlu fótbóltstjóðini. Støðan í hálvleikinum var 3-0. Stóri Liverpool álopsspælarin Peter Crouch setti hol á eftir fimm minuttir. Sjey minuttir seinni var tað enn ein Liverpool maður, Steven Gerrard, sum økti til 2-0 við góðum skoti.

Sjey minuttir undan steðginum var Steven Gerrard, sum var ytstur á miðvøllinum í høgru, aftur við í máli. Hann legði innfyri úr høgru, og Jeramine Defoe heilfluktaði til 3-0. Tveir minuttir eftir steðgin var Defoe aftur upp á spæl og økti til 4-0. Síðsta málið skoraði Peter Crouch, tá ið hann miðskeiðis í seinna hálvleiki stútaði í málið.



## U17 landsliðið venur í dag

Í dag er úttøkuvenjing til U17 landsliðið, sum í oktober skal spæla EM-undankapping í Norðurírlandi. Hesir hava fingið boð: Sámal J. Djurhuus, Ási Dam FS Vágar '04, Viljormur Davidsen, Karl Løkin, Klæmint A. Olsen, Heri Nesá, Jóhan S. Edmundson, Eyðstein Joensen, André Olsen, Remi Langgaard, Petur Meinhard Magnussen NSÍ, Rógvi Holm, Uni Johannesen, Christian í Garði, Ámund Nolsøe, Fríði G. Jensen B36, Gunleif Olsen TB, Martin Tausen, Heini Vatnsdal VB, Erland Berg Danielsen, Hans Jørgensen Skála, Páll Klettskarð, Eli Simonsen, Daniel Dam, Andrias Ellingsgaard, Jógvan Isaksen KÍ, Erling Jacobsen GÍ, Kristin R. Mouritsen, Thomas J. Thomsen HB.

# Úrlætnir frammanfyri

**Total eyðmýking í fyri hálvleiki endaði ikki við mettapi, tí skotar í seinna hálvleiki koyrdu í tómgongd, meðan teir hugsaðu um EM-dystin mikukvøldið**

SKOTLAND-FØROYAR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

**Glasgow:** Skotland skal nú mikukvøldið spæla á útivølli móti Litava. Um Skotland skal hava møguleika at vinna seg í fyrsta endaspælið síðani 1998, hevur tað alstóran týdning, at teir fáa fulla úrtøku burtur úr longu ferðini eystureftir.

Hesin veruleikin var ivaleyst høvuðsorsøkin til, at Føroyar leygardagin á Celtic Park og frammanfyri fleiri enn hálvthundrað túsund væl uppløgdum skotum, sum eftir miseydnaða Berti Vogts tíðarskeiðið aftur veruliga tykjast rokna við sínum monnum, nú Walther Smith hevur ábyrgdina, bara vóru eyðmýktir, men ikki løgdu rygg til mettap.

Mettapini eru 7-0 og 8-1. Hesa ferð taptu okkara "bara" 6-0. Tá ið skotar komu aftur á vøllin eftir steðgin, høvdu teir heilt týðuligt fingið boð um, at nú skuldu teir gira niður. Støðan var 5-0, og eingin orsøk var at taka sær nøkur óráð fyri. Stigini vóru fingin til høldar, og nú snúði tað seg um fyrireikingarnar til stóru avbjóðingina í Litava. Tí løgdu Føroyar ikki rygg til mettap.

### Ódnarveðrið

Líkindini vóru góð, g føroysku spælararnir høvdu veruliga ætlað sær uppreisn eftir eyðmýkingina móti Georgia.

Fyrstu lítlu løtuna var tað ikki so galið, men tá ið tiggju minuttir vóru farnir, var støðan 2-0. Skotarnir høvdu gjørt heimaarbeiðið. Teir nýttu breiddina sera væl, teir høvdu eyga fyri dýpdaravleveringini til sentrala mannin, teir vistu nær teir skuldu seta ferðina niður og lokka mótstøðumenninar fram á vøllin, og teir dugdu væl at skifta millum lítla og stóra ferð.

Darren Fletcher úr Manchester United var ikki til at steðga. Hann bjóðaði seg til um allan vøllin, reikaði og leitaði í røttu holini, søkti inn í brotsteigin, skoraði, legði upp og fekk brotsspark. Í fyrra hálvleiki var hann stóri spælarin á vøllinum, og føroyingar kunnu prísa seg lukkuligar fyri, at hann varð spardur og tikin út í hálvleikinum.

Tá ið Føroyar hava staðið seg væl móti bretskum liðum, hevur tað verið, tí hesi hava oyst høgar skráboltar inn í føroyska brotsteigin. Soleiðis var tað bara eftir steðgin, og tá fingu skotar einki burturúr. Undan steðginum vóru skotar kontinentalir í spælstíli. Teir spældu flatt og skjótt, og teir fluttu seg so mikið skjótt og nógv, at føroysku miðvallararnir og verjuspælararnir vóru um ein háls.

Mistøkini vóru eirindarleyst sektað. Tvey tey fyrstu málini vóru eftir kiks í okkara høgra verjuborði, og eftir at russiski dómarin hevði verið blíður við heimaliðið við at geva teimum tvey brotsspørk,



## Liðið kann blíva heilt gott

**Jákup á Borg heldur, at nýggja landsliðið ikki er nóg væl samanspælt enn, men hann hevur stórar vónir til liðið**

SKOTLAND-FØROYAR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Jákup á Borg, sum telist millum teir royndu spælararnar á landsliðnum, hevur langt frá mist mótið um, at føroyska landsliðið kann fáa góð úrslit í framtíðini.

– Tað er tungt at tapa tveir dystir 6-0, men tá ið eitt nýtt lið skal spælast saman, so kemur slíkt fyri. Vit eru ikki nóg væl samanspældir enn, men eg havi stórar vónir til hetta liðið, sigur hann.

– Eg trúgvi, at hetta kann blíva eitt sera gott lið, og tað eru nógvir góðir spælarar á veg. Tað nyttar sjálvandi ikki bara at verða góður fótbóltsspælari, tað skal eisini ein stórur innsatsur til hvørjaferð, og ímóti Georgia kundu vit givið meira, men tað var frægari ímóti Skotlandi, hóast vit aftur taptu stórt.

Jákup á Borg heldur, at dysturin gekk nógv verri, enn nakar hevði roknað við frammanundan.

– Vit vistu væl, at Skotland hevur tikið seg nógv fram. Teir hava spælt væl í seinastu dystunum, og tí roknaðu vit við einari truplari uppgávu. Men harfrá og so til at verða aftanfyri við 5-0 í hálvleikinum, tað var forferdiligt, sigur hann.

– Eg dugi ikki rættiliga at siga, hvat gekk galið. Teir fingu tvey rættiliga bílig straffir, og tað koyrir okkum eitt sindur niður. Tað bleiv tungt eftir tað.

## Skotar høvdu lætt spæl

Fleiri av málunum hjá skotum tóktust koma í so lætt. Dómarin gav teimum stóra hjálpandi hond við at døma tvey brotsspørk, sum bæði vóru nakað ivasom.

Fyrsta málið kom longu eftir sjey minuttir. Kenny Miller rann frá Julian Johnsson í vinstru, legði inn fyri málið, har Darren Fletcher fekk sent bóltin um málstrikuna.

Tríggjar minuttir seinni økti James McFadden til 2-0. Hann var fyrstur á einum lesum bólti á brotsteigarmarkinum og smekkaði flatt í kassan.

So var tað, at dómarin bríkslaði fyri tveimum brotsspørkum. Fyrst tí Óli skuldi havt felt McFadden, og síðani tí Fletcher sendi bóltin á hondina á Atla. Fyrst skoraði Kris Boyd frá ellivu metrum, og síðani sendi Kenny Miller í málið.

Málið til 5-0 sejy minuttir fyri steðgin var kanska tað best spælda málið. Fletcher stakk mitt fyri, og Boyd gjørdist leysur. Jákup bjargaði fyrstu royndini, men Boyd trilladi returin í tóma málið.

Fimm minuttir fyri leiklok gjørdi Gary O'Connor tað til 6-0, tá hann beindi eitt flatt innleg í málið umvegis labbarnar hjá Jákupi.